# Ábending um orsøkina



*Tað var. meðan pumpað varð úr tangunum hjá Mylluni í Miðvági, at óhappið hendi*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Helst vóru skeiv amboð brúkt, tá avgreiðslumaðurin hjá Shell í Vágum mikukvøldið endaði á Landssjúkrahúsinum við brunasárum eftir eina spreinging í einum tanga við bensinstøðina í Miðvági**

ÓHAPP
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Samanfall av óhepnum umstøðum tykist vera orsøkin til ohappið við Mylluna í Miðvági mikukvøldið. Arbeiðseftirliti kannar málið, men er enn ikki komið til nakra endaliga niðurstøðu. Líkt er tó til, at amboðini, brúkt vóru, ikki vóru tey heilt røttu, metir arbeiðseftirlitið.

Tá avgreiðslumaðurin hjá Shell, seinnapartin mikudagin skuldi fylla blýfrítt bensin í tangarnar hjá Mylluni, hendi tað óhapp, at hann fylti í dieseltangan.

Hann var beinanveg varugur við mistakið, og boðsendi einum bili hjá IRF, sum skuldi tøma úr aftur tanganum og pumpa í tangabilar hjá Shell, sum síðan skuldu flyta alt burtur. Tangin skuldi tømast heilt.

Av løgreglustøðini í Miðvági verður greitt frá, at fyrst varð sogið úr tanganum upp í ein tangabil hjá Shell, og síðan, tá hesin var fullur, skuldi takast upp í tann næsta.

Meðan fylt varð í seinna tangabilin, hendi ein spreinging, sigur løgreglan. Talan var ikki um, at eldur yvirhøvur var brúktur nakrastaðni í námind, sigur løgreglan, sum metir hendingina sum »eitt av teimum ekstremu tilfellunum«, tá óhappið bara hendir.

Maðurin brendi seg nakað í andlitið og um hondina og varð fluttur á Landssjúkrahúsið, men verður ikki sendur til Danmarkar, sigur løgreglan í Vágum.

Arbeiðseftirlitið varð tilkallað og hevur gjørt kanningar i málinum.

Av Arbeiðseftirlitinum verður sagt, at tey hava eina ábending um, hvat kann vera hent, men kortini onga greiða niðurstøðu í skrivandi stund.

Tað er soleiðis, greiðir Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum frá, at streymasndi veskur sum eitt nú bensin og dieselolja, gera statiskan spenning, sum má leiðast burtur onkursvegna. Tað eru tangabilarnir hjá oljufeløgunum útgjørdir til við slangum, sum hava jørðforbindilsi og tann vegin leiða spenningin burtur.

Hinvegin hevði reinsibilurin hjá IRF, sum tók bensini og oljuna upp úr jørðtanganum og pumpaði í oljubilin, ikki slíka slangu.

Tí er stórur møguliki fyri, at spenningurin, sum bensinið og oljan hava skapt, hevur gjørt ein neista, sum síðan hevur orsakað eina spreinging.

Maðurin, sum fekk skaða, stóð uppi á oljubilinum, sum er spildurnýggjum. Treygdin var í lagi, og verja rundan um pallin, maðurin stóð á, og helst tí er hann ikki dottin niður, sigur Karl Joensen.

Stjórin á Shell, Hákun Djurhuus, var á staðnum stutt eftir óhappið. Hann fegnast um, at maðurin tykist vera sloppin rímiliga væl frá óhappinum, sum væl kundi verið størri.

Hákun Djurhuus rósar teimum, sum vóru á staðnum fyri a bera skjótt og rætt at, soleiðs at maðurin fekk ta fyrstuhjálp, sum skuldi til.

– Hann varð rætt viðgjørdur við køldum vatni beinanveg, og tað gekk kanska eitt korter ella so, til hann fekk læknaviðgerð, sigur Hákun Djurhuus.

## Føstulávint á Giljanesi



*Høvuðsstuðulin frá Lions tiltakinum á Giljanesi í fjør varð latin Herberginum hjá Frelsunarherinum. Andras Henriksen, táverandi forseti í Lions Club í Vágum, handar Niels Edvardi Olsen stuðulin*
*Mynd Lions Club Vágar*

**Árliga føstulávintstiltakið hjá Lions Club Vágum verður í ítróttarhøllini á Giljanesi sunnudagin. Ágóðin fer, sum vanligt er, til vælgerandi endamál**

INNSAVNAN
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Eins og undanfarin ár skipar Lions Club Vágar fyri stórum tiltaki í Ítróttarhøllini a Giljanesi sunnudag í føstuinngangi.

Tiltakið er ætlað sum innsavnan, og nógv eru tiltøkini, sum hava fingið peningaligan stuðul frá Lions Club

Lionstiltkaið á Giljanesi verður sett av Lions forsetanum í Vágum, Hans Jacobi Joensen, klokkan 16.00 seinnapartin 2 mars. So verður farið undir ymsu tiltøkini, sum eru nógv.

Stórt eydnuhjól er fast á Lionsdegnum. síðan er tað slíkt sum 21 spæl og tombola. Fiskibrunnur loppumarknaður. Og sum rímiligt er á føstulávint, er eisini tunnusláttur.

Matsøla er eisini, har til ber at keypa smurt breyð og køkur, saman við kaffi ella te. Pitabreyð, pylsur og pizza verða eisini at fáa.

Klokkan 20 fer dansifelagið »Upp á tá« at sýna fram dansir, tey hava dansað í vetur, eins og Sørvágs Tónleikarafelag eisini fer at spæla.

Lions Club plagar eisini at hava lutaseðlasølu um hesa tíðina, og verður vanliga drigið, tá Giljanes tiltakið endar umleið klokkan 23.00 sunnukvøldið. Í ár eru til dømis ein rúgva av gávukortum eins og flogferð at vinna.

Peningurin, sum kemur inn á tiltøkunum hjá Lions Club, verður latin góðgerandi endamálum. Eitt nú hava Vága Bjargingarfelag, Ungdómsorkestrið í Vágum, Heilafelgið og Felagið fyri minnisveik fingið peningaligan stuðul frá Lions Club í Vágum. Í fjør fekk Herbergið hja Frelsunarherinum stuðulin.

Høvuðsstuðulin í ár, verður latin ætlaðari bókaútgávu um samferðslusøguna í Vágum og Mykinesi, sigur Lions Club í Vágum.

# Stígum fast á várt gólv

**Í Miðvágs-Sandavágs Skúla hava tey lært Leivskvæðið í vetur, og nú føstulávint er, samlaðust næmingarnir í fimleikarhøllini at kvøða um Leiv Øssursson**

MENTAN
*Edvard Joensen*

**á Giljanesi:** Næmingarnir í Miðvágs- Sandavágs Skúla savnaðaðust fríggjamorgunin í fimleikarhøllini í skúlanum á Giljanesi at kvøða Leivskvæðið, sum tey hava havt fyri í føroyskum í vetur.

Hetta er afturvendandi tiltak, at næmingarnir soleiðis savnast at kvøða eitt føroyskt kvøði, tey hava lært. Í fjør var tað Seyðamaðurin á Sondum, sum mestsum hoyrir við til barnalærdómin í Vágum.



*Í Miðvágs - Sandavágs Skúla hava tey tann sið at fara upp á gólv á føstulávint. Tá verður dansað og kvøðið slíkt, tey hava lært í føroyskum um veturin*
*Mynd: Edvard Joensen*

Gamalt er, at dansitíðin endar á føstulávint. Í føstu verður ikki farið upp á gólv. Tó er ikki óvanligt at dansa føroyskan dans í privatum veitslum so sum brúdleypi, hóast tað er í føstu.

Á Giljanesi tóku tey saman og dansaðu Leivskvæðið, sum tey hava lært í vetur. Tað var ein av lærarunum, Hervør Jørgensen, sum skipaði. Nógvir av lærarunum vóru uppií, og eisini okkurt foreldur var komið inn á skúlan at luttaka í dansinum hendan fríggjamorgunin undan føstuinngangi.



# Útbyggingin steðgað

**Í 2001 varð farið undir at byggja út niðan fyri Kommunuskúlan. Barakkirnar, sum stóðu í Kongagøtu niðan fyri skúlan, eru rivnar niður, og ætlanin var at byggja ein nýggjan bygning upp aftur til fyrsta og annan flokk. Henda byggingin er nú steðgað, tí ein serstøk byggisamtykt er komin fram, sum sigur, at hetta økið eigur at vera fríøki**

BYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

Enn ein byggisamtykt er komin fram í Tórshavnar Kommunu um eitt fríøki. Her er talan um økið frá Frelsunarherinum, niðan við Tórsgøtu, tvørtur um Grasagarð og heilt niðan til Kommunuskúlan. Hetta økið skal vera eitt fríøki, og tað stendur í eini serstakari byggisamtykt frá 1980.

Henda byggisamtyktin hevur við sær, at ætlaða útbyggingin av Kommunuskúlanum niðanfyri sjálvan skúlan, sum væl og virðiliga er farin í gongd, má steðgast inntil greiða er fingin á, hvat skal gerast.

Gomlu barakkirnar í Kongagøtu eru annars longu rivnar niður og økið er planerað, so klárt er longu at byggja.

– Kommunuskúlin hevur havt stórt plásstrot, og tá vit fyri góðum ári síðani byrjaðu at byggja var ætlanin, at nýggi skúlabygningurin skuldi hava fýra stovur, sum skuldu hýsa fyrsta og øðrum flokki í byrjanini av komandi skúlaári, sigur Heðin Mortensen, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini.

– Barakkirnar eru nú rivnar niður, og trupulleikin hjá okkum er tann, at tá byggjast skal uppaftur, sendu vit málið til grannahoyringar, sum vit eiga at gera. Í hesum føri í Tórsgøtu. Málið varð tikið upp á fundi mánadagin, og tá fingu vit eitt tilmæli, har tað stóð í, at ein serstøk byggisamtykt frá 1980 sigur, at hetta økið eigur at vera eitt fríøki.

### Steðgast

Arbeiðið er tískil steðgað, og málið er sent umsitingini til kanningar.

– Vit høvdu annars alt upp á pláss. Vit høvdu fingið ein arkitekt at tekna bygningin og tað var eisini í umsitingini. Trupulleikin er, at um tú rívur nakað niður, so kemur tað undir nýbyggjarí, um tú skalt byggja nakað uppaftur á sama stað, og tað kunnu vit tískil ikki, sigur Heðin Mortensen.



*Her skuldi nýggi skúlabygningurin við fýra skúlastovum til fyrsta og annan flokk. Byggingin er nú steðgað, tí ein serstøk byggisamtykt frá 1980 er komin fram, sum sigur, at økið skal vera fríøki. Heðin Mortensen, formaður í byggi- og býarsamskipanarnevndini, veit ikki, hvat gjørt verður, men málið liggur í umsitingini í løtuni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nú eru tvey ting í at velja. Antin verður onki bygt ella verður tann serstaka byggisamtyktin broytt, og um hon skal broytast kemur hetta at taka í øllum førum eitt hálvt ár. Fyrst skal málið í byggi- og býarskipanarnevndina og síðani skal tað í býráðið. Síðani skal málið liggja alment frammi, so fólk kunnu koma við møguligum klagum, og tá hesir tríggir mánaðirnir eru farnir skal málið út í Landsstýrið, har teir skulu taka seinastu avgerðina. Um byggisamtyktin verður broytt skal hon aftur niðan í byggi- og býarsamskipanarnevndina. So talan er uttan iva um eina drúgva ferð.

– Hetta er ein tung prosess, sum tekur í øllum førum eitt hálvt ár. Vit eru í dýrastu neyð við skúlum í løtuni. Fyrsti og annar flokkur í Kommunuskúlanum hava hildið til á loftinum í Tilhaldinum. Vit mugu so royna at møguliga leingja avtaluna við tey ella at finna teimum okkurt annað at vera í, sigur formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini.

Eftir ætlan skuldi skúlabygningurin standa liðugur í ár, og um so verður, at serstaka byggisamtyktin verður broytt, so verður arbeiðið í øllum førum eitt hálvt ár seinkað.

– Eg eri sjálvandi keddur av hesum. Vit høvdu kannað alt – havt arkitektar og umsiting í málinum, so vit høvdu tær bestu fortreytirnar fyri at byrja. Nú bíða vit eftir svari frá umsitingini, men eitt er vist, og tað er, at her má handlast skjótt og kreativt sigur Heðin Mortensen at enda.

## Sera óheppið

**Jógvan Arge, sum situr í Mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, sigur, at støðan við Kommunuskúlanum er ógvuliga óheppin. Men fyrst og fremst skal serstaka byggisamtyktin haldast**

BYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg eri ógvuliga bilsin sum býráðslimur, at tað ferð eftir ferð koma slíkar byggisamtyktir fram, sigur Jógvan Arge um málið við útbyggingini av Kommunuskúlanum.

– Hetta er sera óheppið, og tað er løgið at umsitingin ikki hevur betri tak á sínum pappírum, so tey ikki vita, hvør byggisamtykt er galdandi tá byggiætlanir verða lagdar.

Mentamálanevndin beindi málið aftur til umsitingina, har málið hevur verið til hoyringar. Ymiskar atfinningar hava verið frá grannunum, og vóru tað teir, sum gjørdu vart við, at økið skuldi vera urtagarðsøki.

– Eg síggi eitt, og tað er, at býráðsumsitingin skuldi havt betri skil á pappírunum, men hvat skal gerast, dugi eg ikki at siga. Men fyrst og fremst skal byggisamtyktin haldast, sigur Jógvan Arge.

# Tónleikarar á vøllin

**Leygardagin tann 22. mars verður skipað fyri innandura kapping í fótbólti í ítróttarhøllini á Kambsdali. Tað, sum er serligt við hesi kappingini er, at hon er fyri tónleikarar og fólk, sum hava eitt natúrligt tilknýti til føroyskt tónleikalív**

FÓTBÓLTUR
*Ingrid Bjarnastein*

Mentanarhúsið í Fuglafirði skipar saman við pop.fo fyri innandura kapping í fótbólti fyri tónleikarar leygardagin tann 22. mars. Henda kappingin verður í ítróttarhølllini á Kambsdali. Hon er tó ikki bara fyri tónleikarar, men eisini fyri fólk, sum hva eitt natúrligt tilknýti til føroyskt tónleikalív, tað verið seg tøkningar, fjølmiðlafólk, fyriskiparar og líknandi. Aftaná verður stór veitsla í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har alt endar við almennum dansi, og tónleikararnir sleppa at tríva í ljóðførini um hugur er til tess.

Sjálv fótbóltskappingin byrjar á middegi og endar klokkan 19. Hon er sum flest allar inndurafótbóltskappingar, har hvørt liðið verður mannað við fýra spælarum, harafturat í mesta lagi tveimum eykaspælarum. Tónleikarar og tónleikabólkar skulu manna lið og tekna til í felag, men um tað er onkur, sum ikki hevur nakað lið at spæla við, kann viðkomandi venda sær til fyrireikararnar, so eitt lið møguliga kann setast saman við fleiri í somu støðu.

Spælt verður eisini eftir vanligum innandurareglum. Skikkaðir dómarar koma at døma og hvør dystur er fimm minuttir. Liðini verða øll koyrd í bólkar, so øll sleppa at spæla nakrar dystir. Kappingin endar við eini finalu, har vinnarin skal finnast.

### Veitsla

Aftaná kappingina verður veitsla í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Her eru tónleikararnir eisini vælkomnir til at taka makarnar hjá sær við. Kalt borð verður til gestirnar.

Aftaná midnátt verða dyrnar í Mentanarhúsinum lætnar upp til almennan dans. Tá kunnu tónleikararnir eisini sjálvir taka ljóðførini fram og spæla um hugur er til tess. Pallurin og ljóðanlegg verða gjørd klár, so tey ið hava hug, kunnu spæla sum teimum lystir. Eisini verður ein DJ, sum kemur at venda plátum.

Kostnaðurin fyri hvørt liðið er 250 krónur, og harafturat kostar veitslan 200 krónur fyri hvønn.

Um tú ert ein tónleikari ella um tú ert ein av teimum, ið metir seg hava eitt natúrligt tilknýti til tónleik, so kanst tú tekna teg til kappingina á teldupostadressuni pop@pop.fo. Goldið verður fyri kapping og veitslu á konto 106.092.3 í Norðoya Sparikassa. Tá goldið verður fyri kappingina skal viðmerkjast navnið á liðnum, og tá goldið verður fyri veitsluna skal viðmerkjast »veitsla fyri tónleikarar«.

Kappingin og veitslan eru treytað av, at nóg stórur áhugi er fyri at taka lut. Seinasta freist at tekna lið til kappingina er 12. mars 2003. Tá skulu allar upplýsingar verða fyrireikarunum í hendi, og luttøkugjaldið vera goldið.

Upplýsingar og tíðindi verða annars at frætta á pop.fo komandi vikurnar.

SKEIÐ Í DEKORATIÓN



Samskifti
Tel. 422 900
e-mail: samskifti@samskifti.fo
Postboks 133 • 110 Tórshavn
www.samskifti.fo

Skeiðið er ætlað øllum áhugaðum.

Endamálið evið skeiðinum er at geva luttakaranum grundleggjandi innlit í at seta saman vørur, litir og ljós.

*Innihald*
Skeiðið viðgerð í høvuðsheitinum hesi evni:

*Uppseting *Linjur *Samanseting *Brennidepil *Tað gylta snittið *Symmetri *Asymmetri *NCS litsirkul- og trýkant *Psykologiskir virkningar *Skuggaspæl *Effektljós *Ymisk sløg av ljósi v.m.

Skeiðið er leygardag og sunnudag 8 og 9 mars 2003 í Lærarskúlan, Tórshavn
Skeiðið endar við einari eftirmetan og einum skreytblaði.
Kostnaður kr. 2.900,-

Meira fæst at vita við at vitja heimasíðu okkara www.samskifti.fo

*Seinasta freist at tekna seg er leygardagin 5. mars á samskifti@samskifti.fo ella á tlf. 422 900*